


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Verkafólk, sjófólk, reisið tykkum!



Val X

DAN R. PETERSEN
javnaðarmaður

Tað verða ikki tær stóru plakatirnar, sum fara at loysa tykkara trupulleikar
Jú dýrari og størri reklaman er, minni er hjartað fyri júst tykkum.

Dysturin stendur millum bygdirnar og Havnina.
Tað verður ikki yvirklassin á teimum bonaðu gólvunum í Havn, ið betrar tykkara kor. Velji tær prangandi lýsingarnar leygardagin, og tit eru gloymd sunnudagin.
Velji ein bygdamann, ið altíð hevur verið trúgvur móti hugsjónini. Ein ið livir millum tykkum og kennir tykkara kor bæði á sjógvi og landi. Vel tey sonnu javnaðarvirðini, sum undirritaði stendur fyri.

# Útbúgving og vitan



Val X

KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Ungur nemur gamal fremur, sigur orðatakið.
Aðalmálið hjá okkum, ið nú ætla at taka politiskar avgerðir, verður av nýggjum at raðfesta peninganýtslu landsins. Øll vita, at givna upphæddin til ymsu økini eru raðfestingar innanfyri fíggjarlógina. Prógvgrundin, ið ofta hoyrist í kjaki, at peningur er ikki tøkur, er sjálvdan allur sannleikin. Rætta svarið er heldur, hvussu tann tøki peningurin verður raðfestur. Ongantíð áður hava vit havt so nógvan tøkan pening í Føroyum. Tí tora vit nú at raðfesta nýtsluna av nýggjum.
Sjálvstýrisflokkurin raðfestir útbúgving høgt. Í stevnuskrá okkara er málið, at allir skúlar verða skipaðir eftir føroyskum tørvi – tí tora vit eisini í komandi valskeiði at raðfesta útbúgving á føroyskari grund hægri enn nakrantíð sæð áður. Hetta merkir sjálvandi ikki, at onnur øki onki fáa. Tað er raðfesting, ið vit skulu tora betri at gera.
Altjóða vitanarsamfelagið mennist stórliga. Tí eiga vit at fyrireika okkara útbúgvingar og arbeiðsmegi til tær broyttu avbjóðingarnar. Tann gløggi eygleiðarin hevur longu sæð, at vitan kann bæði skapa menniskjalig virði og útflutning. Sjálvstýrisflokkurin lítir á føroya fólk, sum kann taka sær av hesum avbjóðingum eisini.
Lærdómur er lættur at bera, sigur orðatakið.
Vel tí við tíni vitan – vita nú.
X við Sjálvstýrisflokkin og Kristinu Toftegaard Larsen.

# Mínum korti fer eingin skeivur av



Val X

KJARTAN JOENSEN
Løgtingsmaður og fólkafloksvalevni – List A

Hesar tveir seinastu dagarnar hevur sonn øsing staðist av einum tvílittum korti, sum skal eitast at vísa á ymiskligu politisku grundsjónarmiðini, við heitinum "politiska landslagið".
Hóast kanningar eru settar í verk, veit eingin hvaðani kortið stavar, hvør hevur latið tað inn til posthúsið og hvør ætlanin er við hesum.
Av fólkið verður hildið, at hetta er heldur ófrættakent, tí eingin vil kennast við tað.

**Ógvuliga ymisk kort**
Annað kort er komið í føroysku heimini, har eg havi loyvt mær at greiða frá, mínum politikki.
Tí fari eg enn einaferð at heita á mínar føroysku veljarar, um ikki at sita heima valdagin, men geva mær fullan stuðul.
Mínum korti fara Tygum ikki skeivur av!

# Tú sum starvast innan heilsuverki



Val X

JÓNGERÐ NIELSEN
Javnaðarflokkurin
Listi C

Er tú ein av teimum mongu sum eisini starvast innan heilsuverkið í Føroyum?
Tað eri eg, og tað eri eg glað fyri og ikki minst stolt av.
Heilsuverkið í Føroyum er viðvirkandi til vælferðina hjá okkum.
Tí er tað neyðugt at raðfesta heilsuverkið høgt, um vælferðin skal halda áfram.
Starvsfólkini innan heilsuverkið eru somuleiðis við til at tryggja okkum vælferðina. Uttan okkum er trupult at halda áfram við vælferð her á landi.
Eg vil gera mítt til, at vit sum starvast innan heilsuverkið verða hoyrd og sædd frá politiskari síðu. Vit eru og skulu verða ein viðspælari tá avgerðir verða tiknar innan heilsuøkið.
Hetta er ein av orsøkunum til at eg havi valt at stilla upp.
Orsøkin til at eg havi valt at stilla upp fyri Javnaðarflokkin er tann, at Javnaðarflokkurin er tann flokkurin sum kann tryggja okkum framhaldandi vælferð. Javnaðarflokkurin er garantur fyri vælferðini.
Heilsuverkið er raðfest høgt í valskránni hjá Javnaðarflokkinum, hetta er eitt av okkara hjartamálum.
Nú vali nærkast, hava allir flokkar eina meining um okkara heilsuverk, og tað er at fegnast um. Heilsuverkið kemur undir tey bleytu virðini her í samfelagnum.
Vit sum starvsfólk eru tey sum hvønn dag arbeiða við teimum bleytu virðinum..
Eg og tú, so í felag kunnu vit røkka langt. .
Í tøttum samstarvið ynski eg, at vit komandi valskeið kunnu fáa okkara heilsuverk til at virka enn betur, og fáa tey bleytu virðini inn í okkara politik..
Eg meini at eg sum sjúkrarøktarfrøðingur, kvinna og starvsfólk á Landssjúkrahúsinum eri tann rætti at umboða heilsuverkið á tingið komandi valskeið.
Tí er mítt ynski at tú fer á val leygardagin og settur tín kross fyri Javnaðarflokkin.
Vit kunnu ikki verða nøgd við tað næstbesta, men tað allarbesta, tí skal tú velja meg.
Títt umboð á tingið.

# PATENTIÐ (ið ikki var til)



Val X

KRISTIAN MAGNUSSEN
løgtingsmaður og valevni

Javnaðarflokkurin hevur ikki patent uppá vælferðaskipanina.
Men, tað er ein ítøkiligur og søguligur veruleiki, at tað eru javnaðarflokkar, ið hava tryggja okkum ta vælferðina, ið vit hava í okkara parti av heiminum.
Javnaðarflokkurin hevur ikki patent uppá ein mennandi vinnupolitik.
Men, tað er ein ítøkiligur og søguligur veruleiki, at tað eru javnaðarflokkar, ið hava verið drívmegin í tí framburði, sum m.a. hevur gjørt at tey skandinavisku londini – tað skandinaviska modellið, hevur sigrað. Onga aðrastaðni er vælferðin so stór og ríkidømi so javnt býtt, sum í teimum skandinavisku londunum – aloftast við javnaðarflokkunum á odda.
Enn eru vælferðartiltøk neyðug og býtast skal javnari, men fíggjarligur framburður og økt vælferð í síðsta valskeiði er prógv um, at vit eru á rættari leið.
Velji tí javnaðarflokkin

# Trivnaðurin hjá búð-og starvsfólki á sambýlunum hóttur



Val X

HANS ALBERT HANSEN
Sambandsflokkurin

Nógv sambýlir í landinum hava í dag fleiri búðfólk, ið størri ella minni mun krevja røkt. Hetta er ein trupuleiki hjá starvsfólki og búðfólki. Starvsfólkanomeringin tekur ikki hædd fyri øktu starvsbyrðuni ið stendst av hesum. Hølisinnrætningurin er í mongum førum óhóskandi av somu orsøk. Sum dømi kann nevnast, at hurðaopini eru so trong at sengur mugu skrúvast sundur fyri at sleppa ígjøgnum. Alt hetta elvir til verri trivna millum tey overvaðu starvsfólkini - umframt verri tænastu og trivna hjá búðfólkunum.

Veruleikin er at tað gerast alt fleiri eldri fólk í Føroyum, so hetta er ikki ein fyribilstrupuleiki. Eldraøki má tí alsamt dagførast. Tað er umráðandi at neyðug játtan og normering tillagast uppgávubýti hjá starvsfólkunum so trivnaðurin gerst betur hjá øllum pørtum.